# ítróttur

Nr. 158 • leygardagur • 18. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


## Dystir hetta vikuskiftið:

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 19.08 | B36-GÍ | Suni Johansen |
| 19.08 | NSÍ-KÍ | Petur E. Kjærbo |
| 19.08 | VB-HB | Eiler Rasmussen |
| 19.08 | B71-B68 | Dagfinn Olsen |
| 19.08 | EB/S-FSV | Birgir Sondum |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18.08 | B36-Skála | Erling Eysturoy |
| 18.08 | Sumba-NSÍ | Regin Egholm |
| 18.08 | LÍF-HB | Edvard Højgaard |
| 18.08 | KÍ-ÍF | Rúni Gaardbo |
| 18.08 | TB-GÍ | Petur Hans Joensen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 19.08 | B36-GÍ | Erling Eysturoy |
| 19.08 | Royn-KÍ | Frits Poulsen |
| 19.08 | VB-AB | Ólavur Weihe |
| 19.08 | B71-B68 | Tummas P. Olsen |
| 19.08 | TB-ÍF | Eigil Olsen |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 19.08 | B36-KÍ | Hans Eivind Olsen |
| 19.08 | B71-B68 | Laurits í Króki |

B36-GÍ:

# Avgerðin kann fella sunnudagin

**Tað er væl hugsandi, at sigursharrin sunnudagin eisini verður sigursharrin í FM-stríðnum, tá avtornar, og í øllum førum verður tað ein tvídystur millum hesi bæði liðini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

At kalla alt kappingarárið á tamb hevur tosið fyrst og fremst snúð seg um tvey lið, tá tey fótbóltshugaðu hava tosað um møguligar FM-kandidatar. GÍ og B36 hava kapprunnði í oddinum alt árið. Eina ferð hevur hvør parturin spælt javnleik, og meðan gøtumenn framhaldandi eru ósigraðir, hevur B36 tapt einaferð. Á útivølli í Gøtu.

### Skulu vinna

Hetta hevur árstalsfelagið møguleika at hevna sunnudagin, men tað er tó nógv meira enn bara hevnd, sum stendur upp á spæl, tá liðini fara á vøllin. Ikki minst hjá B36 stendur nógv á, tí alt annað enn ein sigur gevur GÍ stórar fyrimunir, og hetta tykjast leikararnir hjá B36 eisini at vera greiðir um.

- Sjálvandi eru allir dystir týdningarmiklir, men sum støðan er nú, so er tað alt avgerandi, at vit vinna dystin, sigur liðskiparin hjá B36, John Petersen.

- Fáa vit javnleik, skal GÍ missa fýra stig í seinstu dystunum, samstundis sum vit skulu vinna allar, so hjá okkum er einki at tosa um í so máta.

Spurdur, um júst leikti landsdysturin móti Jugoslavia ikki hevur sett síni spor á landsliðsleikararnar hjá B36, sigur John Petersen, at tað hevur hann kanska, men hann roknar tó ikki við, at hetta fer at bila.

- GÍ hevði ongan leikara við hesa ferð, meðan vit høvdu fýra, og vit skulu sjálvandi hava drúgvu ferðina úr beinunum. Sálarliga haldi eg við vissu, at vit eru klárir. Tað var næstan soleiðis, at tankarnir fóru at leita til dystin sunnudagin, beint sum dómarin hevði floyta av í Beograd, so tað eri ikki bangin um, sigur John Petersen at enda.

Annars er líkt til, at B36 hevur so at siga alt fólkið tókt til dystin. Egil Zachariassen fekk forfall beint undan dystinum móti EB/-Streymi, men hann er so byrjaður at venja aftur. Klæmint Matras hevur onkran skaða í tjúkkanum, men teir vóna tó, at eisini hann verður tøkur.

Einasti leikarin, sum við vissu ikki eru tøkur, tykist vera Kenneth Jacobsen, sum í tvær vikur hevur drigist við skaða.



*Talan verður um tað, sum fer at líkjast ársins dysti í ár, tá oddaliðini í føroyskum fótbólti bresta saman í Gundadali sunnudagin*

### Alt er klárt

Gøtumenn eru sjálvandi eisini spentir til dystin, men tá vit tosaðu við liðskiparan hjá teimum, Magna Jarnskor, hóskvøldið, tóktist hann tó meira avkláraður undan uppgávuni.

- Hetta er sum so ein dystur á vegnum í FM-kappingini. Hóast talan er um oddadyst, so royna vit í øllum førum at taka uppgávuna, sum vit vanliga gera, og tað vil siga, at vit so avgjørt ikki vilja tapa.

Spurdur, um týdningurin kortini ikki er eitt sindur størri hesa ferð, sigur Magni tó, at tað er hann kanska.

- Tað verður jú bara spælt um trý stig, men tú hevur sjálvandi rætt í, at hetta er ein sonevndur seks-stig dystur, men tað mugu vit bara royna at skúgva til viks. Vit fara á vøllin at gera okkara besta.

Annars heldur Magni, at gøtumenn eru so væl fyri, sum til ber, nú teir gera seg til at fara til Havnar. Sámal Joensen og Helgi L. Petersen tykjast báðir vera komnir heilt fyri seg, og harumframt er Hans Pauli Petersen eisini farin undir aftur venjingina, men eftir drúgva skaðan í lærkrikanum er ivasamt, um hann verður við frá fyrsta bríksli.

- Jú, eg haldi at vit eru allir klárir til dystin, og bæði vóni og rokni við, at talan verður um ein góðan og spennandi dyst, sum nógvir áskoðarar fara at leita sær til. Áskoðararnir hjá okkum plaga at vera trúgvir, og eg ivist ikki í, at teir eisini fara at stuðla okkum hesaferð, sigur Magni Jarnskor at enda.

# Tølini tala

*Niðanfyri verður víst, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg, tá tey hava dystast seinastu tíggju árini*

| | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | '92 | '91 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-GÍ | 3-1 | 4-0 | 1-1 | 5-2 | 0-0 | 0-2 | 2-5 | 0-2 | 1-1 | 3-2 | 4-3-3 | 19-16 |
| NSÍ-KÍ | 2-1 | 1-3 | 0-0 | 0-2 | - | 1-2 | 2-1 | - | 1-0 | 1-0 | 4-1-3 | 8-9 |
| VB-HB | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 1-0 | 1-1 | - | 2-1 | 1-1 | 1-2 | 3-5-1 | 9-7 |
| B71-B68 | 2-3 | 1-0 | - | 1-2 | 4-2 | 2-1 | 2-0 | 2-0 | 2-4 | - | 5-0-3 | 16-12 |
| EB/S-FSV | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |



VB-HB:

# Seinasta útkall

**Fyri bæði liðini er helst galdandi, at tey skulu vinna, um tey skulu gera sær vónir um bronsumerkini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tey bæði fremstu liðini í fjør vóru sum kunnugt VB og HB, men í ár hevur tó ikki skorist eins væl hjá teimum báðum. Hampuliga tíðliga mistu tey takið á teimum báðum oddaliðunum, og síðani summarsteðgin hevur eisini verið líkt til, at tey hava mist takið á bronsumerkjunum.

Tí eru báðir partar snøgt sagt tvingaðir at vinna sunnudagin, men tað skerst tó ikki burtur, at báðir partar eru rættiliga skerdir til dystin.

Hjá VB er tað fyrst og fremst saknurin av liðskiparanum, Eyðun Jacobsen, sum man kennast svárur. Hann var heldur ikki við í Klaksvík, tá VB tapti so dyggiliga, og í Vági siga teir seg ikki rokna við honum til vikuskifti. Beiggi liðskiparan, Magni Jacobsen, var heldur ikki við í Klaksvík, men hann hevur so vant við fullari ferð alla vikuna, og verður helst tøkur.

Harafturat kemur, at Tórður Holm heldur ikki verður á vøllinum. Undan dystinum í Klaksvík varð hann mettur sum rættiliga ivasamur, men hann fekk tó kortini spælt. Hesa ferð er miðvallarin tó leikbannaður, so har gerst einki.

Hjá HB stendur heldur einki til við fólki fyri tíðina. Hóast teir høvdu frí undanfarna vikuskifti, so er enn ikki eydnast at fáa Rúna Nolsøe kláran til dystin, og hóskvøldið var mest sum avgjørt, at vanligi liðskiparin ikki verður við.

Tað verður Jón Rói Jacobsen neyvan heldur. Hann gav avboð til landsliðið, tá hann fekk ein snudd undir venjing í seinasta viku, og enn er hann ikki komin heilt fyri seg. Vanligi málverjin, Bárður Johannesen, er framhaldandi skaddur, og tá Hallur Danielsen so eisini hevur leikbann, tykist rættiliga sannlíkt, at tað verður eitt munandi umskipað HB lið, sum fer á vøllin vesturi á Eiðinum í Vági.

NSÍ-KÍ:

# KÍ stevnir framá

**Síðani summarsteðgin hevur gingið væl hjá KÍ, og fáast trý stig sunnudagin, fara bronsumerkini av álvara at hómast**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu í týsdagsblað okkara, so er nú líkt til, at restin av kappingarárinum verður ein oyðimarkargonga hjá runavíkingum, sum at síggja til hvørki kunnu røkka einum ella øðrum.

Seks dystir eru tó eftir, og einki er at ivast í, at runavíkingar ætla at fáa sær úrtøku úr hesum. Fyrstur av hesum er heimadysturin móti KÍ, og í øllum førum eru fortreytirnar hjá runavíkingum undan dystinum hampuliga góðar.

Djóni N. Joensen var burturstaddur, tá NSÍ taptu fyri B68, men hann verður so í øllum førum við aftur. Hinvegin er tað heldur ivasamt, um Brynjálvur Nielsen og Dánjal Hansen verða tøkir. Báðir fingu teir smærri snuddir á Toftum, og eru ikki førir fyri at venja við fullari ferð.

### KÍ stevnir framá

Í Klaksvík er einki at ivast í, at fótbóltshýrurin nú er betri, enn hann hevur verið leingi. Síðani summarsteðgin hevur liðið fingið tveir sigrar á rað, og nú eru fólk so smátt farin at tosa um heiðursmerki.

Hetta tykist tó ikki rína við venjaran, Tomislav Sivic, sum sigur at teir í øllum førum mugu vinna í Runavík, um so skal vera.

- Lat okkum nú síggja. Vit hava framvegis fleiri týdningarmiklar dystir eftir, og fyrst og fremst mugu vit vinna dystin í Runavík heldur hann.

Tomislav hevur annars at kalla allar sínar mans tøkar. Hjalgrím Elttør fekk onkran snudd á landsliðsferðini til Jugoslavia, og hóskvøldið var enn ikki greitt, hvussu álvarsamt hetta var.

Hópurin hjá KÍ er ikki hin breiðasti í landinum, so tey vóna, at tað fer at bera til hjá evnaríka leikaranum at verða við. Annars tykist talan verða um sama fólk, sum var við í sigrinum á VB fyri viku síðani.

EB/S-FSV:

# Bæði kunnu bjarga sær

**Roknast kann helst við, at viljin til at vinna verður størri enn óttin fyri at tapa, tá tvey av niðurflytngarevnunum hittast á Eiði**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Undan kappinginarárinum tóktist breið semja at verða um, at uppflytararnir úr EB/Streymi fóru at verða tað liðið, sum fór at flyta niður aftur í næst bestu deildina, tá kappingarárið var av.

Árið hevur tó hilnast hampuliga væl hjá hampuliga væl hjá uppflytarunum, og við einum sigri kunnu teir at kalla toga seg burtur úr øllum niðurflytingarvanda.

Mótstøðuliðið hevur tó eisini tørv á stigum. FS Vágar hevur stóran part av árinum verið dømt til niðurflyting, men við sigrinum á B71 fyri viku síðani søgdu teir hendan leiklut frá sæ fyribils. Trý stig sunnudagin kunnu eisini geva teimum framhaldandi tryggleika, og ivleyst fara bæði liðini á vøllin sunnudagin eftir øllum stigunum.

### Mest sum fullmannað

Liðini bæði eru eisini at kalla fullmannað til dystin. Á heimaliðnum er Knút Vesturtún einasti missurin. Hann fekk triðja gula kortið seinast, og hevur tí leikbann. Annars eru allir mans tøkir, og nú Jákup Martin Joensen er fluttur heim, gerst miðvøllurin so avgjørt ikki veikari.

FS Vágar hava eisini mest sum alt sítt fólk tókt. Kim Poulsen noyddist út við skaða móti B71, og hann fær helst ikki spælt, men í aðrar mátar eru allir tøkir. Tór-Ingar Akselsen hevur verið burturstaddur síðani summarsteðgin, men er nú tøkur aftur, eins og Ruslan Screlea, sum var leikbannaður síðst.

Jógvan Hendrik Samuelsen og Per Joensen eru báðir framvegis í Føroyum, og ivaleyst verða teir báðir eisini við í royndunum at tryggja vágamonnum enn eitt ár í bestu fótbóltsdeildini.

# Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 11 | 10 - 1 - 0 | 37 | 10 | 27 | 31 |
| 2 | B36 | 11 | 9 - 1 - 1 | 40 | 9 | 31 | 28 |
| 3 | B68 | 11 | 5 - 2 - 4 | 22 | 18 | 4 | 17 |
| 4 | VB | 11 | 5 - 1 - 5 | 27 | 15 | 12 | 16 |
| 5 | HB | 11 | 5 - 1 - 5 | 21 | 14 | 7 | 16 |
| 6 | KÍ | 11 | 5 - 0 - 6 | 12 | 26 | -14 | 15 |
| 7 | NSÍ | 11 | 4 - 2 - 5 | 12 | 14 | -2 | 14 |
| 8 | EB/Streymur | 11 | 3 - 1 - 7 | 11 | 18 | -7 | 10 |
| 9 | B71 | 11 | 2 - 1 - 8 | 10 | 27 | -17 | 7 |
| 10 | FS Vágar | 11 | 2 - 0 - 9 | 10 | 51 | -41 | 6 |

B71-B68:

# Bæði noyðast at vinna

**Sandoyingar skulu vinna, um nakar møguleiki skal vera at lívbjarga sær**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Sum vit vístu á í týsdagsblaðnum, so sær tað nú ógvuliga svart út hjá sandoyingum. Dystarskráin er sera torfør, tað sum eftir er av kappingarárinum, men hinvegin skulu stig fáast, um møguleiki skal vera at halda sær í deildini, og ein møguleiki er so nú, tá B68 kemur á vitjan.

Útgangsstøðið hjá báðum liðunum verður á leið hitt sama, sum tað var fyri einari viku síðani. Sandoyingar mugu tó vera Jógvan Jón Petersen fyri uttan í verjuni, eftir at hann fekk gult kort í botndystinum móti vágamonnum.

Hjá B68 er støðan hinvegin munandi betri, enn hon var til lokaluppgerðina móti NSÍ, tá fleiri av stuðulsspælarunum vóru frá. Jan Dam og Fróði Benjaminsen eru báðir tøkir eftir leikbann, og uttan iva fara hesir beint inn á liðið. Einasta ivamálið tykist vera Magnus Poulsen, sum stríðist við ein skaða í økslini, men í hansara stað hevur Kjartan Nesá verið ein sera góður vikarur, so tað fer at líkjast einum B68-liðið í fullari manning.

Tað verður helst eisini neyðugt, um tað skal eydnast liðnum at endurvinna bronsumerkini, tí tað er einki at ivast í, at sandoyingar fara at stríðast við lív og sál í tí, sum skjótt fer at líkjast seinasta útkalli fyri framhaldandi fyrstu deildarfótbólti.